## Obama-dukka hongd



Trygdartænastan hjá amerikanska forsetanum, Secret Service, kannar nú eitt mál, nær ein svørt dukka við navninum Barack Obama á er funnin hongd í suðurstatinum Georgia. Dukkan hekk uttan á einum bygningi í høvuðsgøtuni í býnum Plains, og hon bleiv tikin niður, so skjótt myndugleikarnir fingu boð um hana, skrivar Reuters. Blaðið Atlanta Journal-Constitution skrivar, at løgregluovastin í Plains vil ikki gera nakra viðmerking til málið, men vísir til Secret Service. Býurin Plains er annars kendur sum heimbýur hjá fyrrverandi forsetanum Jimmy Carter.

## Ágangur ímóti lesandi

India leggur avstralsku myndugleikarnar undir at venda tað blinda eygað til ágangin ímóti indiskum ungfólki, sum lesa í Avstralia. Fyrradagin varð ein 21 ára gamal indiskur lesandi álopin og myrdur í Melbourne. Indiska stjórnin sigur, at talan var um eitt rasistiskt morð, men tað avsanna teir avstralsku myndugleikarnir. Umleið 70.000 indarar útbúgva seg í Avstralia, og seinasta summar mótmæltu teir tí, sum teir lýstu sum ágang og fremmandahatur. Aftan á morðið leygardagin stúra teir fyri meiri ágangi ímóti útlendskum lesandi, skrivar Reuters.

# Karráur harðskapur

**Eitt leygarkvøld í november varð ein 17 ára gamal drongur smildraður sundur í býnum í Havn. Hann veit ikki hví, og mamman er forfard**

HARÐSKAPUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Eftir so at siga hvørt vikuskiftið sigur politiið frá harðskapi í Havnar gøtum. Vit fáa bara at vita, at so og so nógv eru farin á skaðastovuna.

Av og á frættist eitt sindur meira um harðskapin, tí fleiri harðskapsmál enda í rættinum.

Ein mamma, um Sosialurin hevur tosað við, vil fegin greiða frá, hvussu hon upplivdi tað, tá ið 17 ára gamli sonur hennara varð illa bukaður eina leygarnátt í november mánaði. Avleiðingarnar vóru skelkandi.

Hetta kvøldið fór hann til Havnar saman við tveimum vinmonnum í føðingardag, og seinni fóru teir allir ein túr í býin.

– Eg var ikki har, so eg kann ikki vita, hvussu tað hendi. Men sonurin segði mær, at hann eina ferð fór frá hinum aftur um eitt hús at pissa. Har stóðu nakrir aðrir dreingir, og ein noktaði honum at pissa. Bygdafrell varð hann kallaður. Mitt í øllum kom ein annar og slerdi son mín, sigur mamman.

Tá komu Náttarravnar og skiltu teir at, og sonurin fór so gangandi oman gjøgnum býin.

### Sligin í andlitið

– Tá gjørdi sonurin tað býtta, at hann fór niðan aftur og spurdi, hví hann ikki kundi sleppa at pissa. Tá kom hin, sum hevði sligið hann, eina ferð aftrat eftir honum og slerdi hann við nevanum fleiri ferðir beint í andlitið.

– Jú, teir vóru allir ávirkaðir, men harfyri er tað meningsleyst at gera seg inn á eitt annað menniskja, sigur mamman.

Hon visti ikki av nøkrum. Hon hevði avtalað við sonin, at um hann ikki kom heim og gisti í Havn, skuldi hann siga henni frá. Um tvey-tíðina um náttina sendi hann henni eitt sms og segði, hvar hann skuldi gista.

### Fekk hjálp frá vinmanni

Tá ið drongurin varð sligin niður, varð beinanvegin ringt eftir sjúkrabili, og ein eldri vinmaður beiggja hansara fór við honum á Landssjúkrahúsið og seinni til politiið at melda tilburðin.

– Morgunin eftir ringdi hann til mín og bað meg koma eftir sær. Hann segði eisini, hvat var hent, sigur mamman.

### Illa farin

– Sonur hennara sá alt annað enn væl út. Nøsin var brotin, kjálkabeinið somuleiðis. Stór blóðsamling var í andlitinum, og armar og bein vóru skurslað. Hann hevði ilt í øllum kroppinum. Eg veit ikki, um hann eisini hevur verið sparkaður, meðan hann lá niðri. Blóð var á klæðunum, sigur mamman.

Hon var illa við av hendingini.

Tað tók sína tíð at lekja sárini aftur.

Men tað kanska ringasta var eftir enn.

– Tað er óhuliligt soleiðis at gera seg inn á eitt annað menniskja, men avleiðingarnar vóru óhugnaligar. Drongurin læsti seg inni í sær sjálvum við øllum tonkunum, tí hann setti sær spurningin, hví slíkt skuldi raka júst hann, sigur mamman.

Hon hevði altíð lagt dreinginum eina við at ansa sær, tá ið hann fór í býin, og tað hevur hon eisini mint hann á eftir tilburðin. Hann hevur verið ein túr í býin aftur, og tað var upp á ein annan máta.

Av tí at drongurin hevði tað so ringt við seg sjálan eftir alhølvingina, fingu tey gjøgnum barnaverndina borið so í bandi, at hann slapp at tosa við sálarfrøðing. Tað hjálpti væl, heldur mamman.

### Vandamikið

Hon er lukkulig um, at drongurin ikki var sligin í høvdið, og at tenninar vóru heilar. Tá ið hann var aftur á Landssjúkrahúsinum segði læknin við hann, at hann mátti ikki fáa fleiri slík sløg.

– Sum tit vita, verða boksarar ikki klókari við tíðini, segði læknin.

– Mamman ætlar sær við dronginum, tá ið málið kemur fyri í rættinum, og hann skal vitna.

– Sum eg skilji tað, er hattta bara ein av fleiri slíkum hendingum. Tað er nógv fyri, at slíkt skal vera ein partur av býarlívinum í Havn.

Fyri at verja sonin og av ótta fyri hevnd, leggur hon ikki í at stíga fram navngivin.



*Nógvur meingsleysur harðskapur er javnan í býnum í Havn*

## Tvey grov harðskapsmál

**Tveir menn verða skuldsettir fyri at hava sligið tveir aðrar menn nýggjársmorgun**

HARÐSKAPUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Nýggjársmorgun var aftur rok í býnum í Havn, og í tveimum førum gekk tað hart fyri seg, Hetta er tað, sum politiið veit um.

Ein ungur maður fekk nevan frammaná tríggjar ferðir, og ein annar varð bæði skallaður og sligin. Hesin misti báðar framtenninar, og nøsin brotnaði.

Politiið veit, hvørjir teira báðir vóru, sum slerdu, og teir verða skuldsettir fyri harðskap.



## Níggju veðurlomb brunnu inni

**Fýrverk festi eld í eitt hoyggjhús í Hvalba leygardagin, og húsið brann í grund**

ELDUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinnapartin leygardagin kom eldur eítt eitt meira enn hundrað ára gamalt seyða- og hoyggjhús í Giljum í Hvalba.

Eingin streymur var inni í húsinum, og tí var greitt, at eldurin mátti vera komin uttaneftir.

Tað vísti seg eisini, at nakrir dreingir høvdu spælt við fýrverk, og eitt heksaýl var av óvart farið gjøgnum okkurt op inn í húsið.

Inni í húsinum var eitt nú plast at balla við og gamalt hoyggj, og tí stóð húsið beinanvegin í ljósum loga, og eingin kundi tí fara inn.

Úrslitið av tí var, at níggju veðurlomb brunnu inni.

Í húsinum vóru somuleiðis sláimaskinur, ballimaskina og onnur útgerð. Tað fór alt fyri einki.

## Árend í busskýli

**Ein kvinna varð undirdíkt í glassplintrum, tá ið ein bilur rendi á bussskýlið, har hon stóð við Sjógv í Kollafirði**

FERÐSLUÓHAPP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Fleiri ferðsluóhapp hava verið um ársskifti, og í einum føri kundi havt endað heilt galið.

Ein 29 ár gomul kvinna stóð mikudagin við kufferti og bíðaði í bussskýlinum við Sjógv í Kollafirði. Ein bilur kom koyrandi norðureftir, í hálkuni misti bilførarin tamarhaldið á bilinu, sum fór tvørtur um vegin og rakti busskýlið.

Kvinnan fekk fleiri skeinur, og glasspiltur regnaðu niður yvir hana.

Skýlið fór í smildur.